DAGSINS MEINING

Demokratiinum til lítlan sóma

Ein teldupostur gjørdi rættiligan vørr í tí annars harða orðaskiftinum um ólavsøkurøðu løgmans. Í tíðindaskrivi ávaraði løgmaður ímóti ætlanunum í teldubrævi, ið oddafólk í felagsskapinum Hesuferð, hevði sent fleiri føroyingum. Brævið er skrivað av Kjartani Hoydal, sum flestu føroyingar kenna, var í nógv ár leiðandi embætismaður í Tinganesi og hevur verið nógv frammi í almenna orðaskiftinum. Av misgáum er brævið endað í skeivum hondum, soleiðis hevur eisini løgmaður fingið eitt eintak. Hann kennir seg so »úthongdan«, at hann kunnger tað við sínum viðmerkingum. Í brævinum bjóðar KH sær vegna Hesuferð at gera uppskot til lesarabrøv og skjýtur upp, at Hesuferð mótmælir, at løgmaður áhaldandi roynir at billa fólki inn, at vit eiga at samráðast við danir osfr.

KH sigur, at løgmaður roynir at forða felagsskapum, ið hava aðra áskoðan enn hann, at virka. Hetta man neyvan hava verið ætlan løgmans. Tað er væl skiljandi, at løgmaður tekur sær hetta brævi nær, tí her er farið ov langt. Tá tað vísir seg, at persónar, ið standa varaløgmanni og Tjóðveldisflokki so nær, og sum løgmaður byggir sítt samstarv á í Tinganesi, standa aftanfyri tí tú kanst kalla ein »skipað herferð« móti eitt nú løgmanni, er skilligt, at hann talar at.

Vit fara ikki at leggja okkum út í, hvat felagsskapir sum Hesuferð gera og siga, men innihaldið í slíkum brævi skapar ikki kenslu av einum demokratiskum sinnalag. KH er heldur ikki ein og hvør í samfelagnum. Hann er m.a. nevndarformaður í tí føroyska oljufelagnum, hvørs partaeigarar eru fólk í øllum flokkum. Kanska eisini tann sannroynd átti at fingið hann til at borið seg øðrvísi at. At hann vil gera sínar egnu viðmerkingar til dagsins mál er hansara rættur, men at bjóða seg fram at gera uppskot til innihald í lesarabrøvum hjá øðrum at taka til sín og sum hava eitt miðvíst politiskt sikti, er ódámligt og tí annars siðiliga og vælformulerandi Hoydal til lítlan sóma.

Tá sami maður eftirlýsir orðaskifti og sigur, at tað er so trupult at fáa slíkt í Føroyum, hevur hann rætt. Men tá tað skal vera neyðugt at framleiða meiningar fyri og til onnur setir hann fót fyri sama orðaskifti. Og tá hugsað verður um hvussu hatskt og niðurgerandi mangt av tí, sum er komið frá fólki frá hesum vonginum hevur verið er tað ikki júst tað sum appelerar til eitt siðiligt og kveikjandi orðaskifti. Tvørturímóti hevur nógv av skrivingini gjørt, at fólk við øðrum meiningum, hava ikki torað at sagt sína hugsan av ótta fyri at verða útrópt landasvíkjarar ol. So Kjartan og Hesuferð eiga at taka í egnan barm og skifta kós.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

»Hesuferð« skal tað verða »Endlösung«

Rolf Guttesen

Nú er so komið undan kavi tað, sum nógv høvdu grunað. Tað eru bakmenn, sum stýra kotamanninum í landsstýrinum og aktivistfylkingini »Hesuferð«. Eitt tekniskt óhapp bleiv ein politiskur brølari. Eitt e-meyl frá almennari skrivstovu í London reyk út til nakrar skeivar adressur m.a. Sosialin og Dimmu, og á onkran hátt kom tað eisini til løgmans.

Og eg skilji væl, at hann øtaðist. Ein samgongufloklur arbeiðir við ætlanum um at mótarbeiða og helst sabotera samráðingarlinjuna við donsku stjórnina um yvirtøkur og styrkt sjálvstýri ella fullveldi. Tjóðveldismenn kunnu sjálvandi siga, at teir ikki eru tað sama sum átakið »Hesuferð«. Men tíbetur duga fólk flest eisini at hugsa, og síggja hvussu tingini hanga saman.

Hvør billar fólki nakað inn?

Tað sigst í meylinum, at løgmaður roynir »at billa fólki inn«, at nakað meira er at samráðast um. Um ikki so er, so er eittans annað at bjóða uppá: Sjálvtekt. Og tað er eisini tað, sum á ymiskan hátt er innbakað í »sjálvstýrisleistin«, sum løgmaður - helst undir trýsti - hevur sett sítt navn undir. Fyrst skal politiið yvirtakast, við ella uttan samráðing. (Minnst til at tjóðveldis- og hesuferðfólk longu sita á Útvarpinum og Sjónvarpinum og eisini í øðrum miðlum). So skjótt kunnu teir sita bæði á propagandaapparatinum og maktapparatinum. Og so sita teir á »fullveldinum«, har (summir) føroyingar »hava evsta vald«.

Tá og Hesuferð

Til hetta skulu aktivistarnir í »Hesuferð« brúkast. Kravgongur, lesarabrøv, hóttanir. Anonymir bakmenn skriva kladdur til lesarabrøv, sum hentir idiotar seta navn sítt undir. Ikki samráðing, men provokatión. Ikki fólkaligt og politiskt tolni, men konfrontatión.

»Hesuferð« er tað útvalda liðið, verjubólkurin, Schutsstaffel, sum skal verja leiðaran og føra vilja hansara til veruleika. »Okkara áhugi er ikki at taka lut í flokspolitiska arbeiðinum á tingi«, sum tey skriva á heimasíðuni. (Har eru annars bæði greinasavn og kjaksíða, men einki er undirskrivað, alt er anonymt!). »Hesuferð« er sjálvandi valt sum navn á átakinum, sum teir kalla tað, tí hesuferð skal loysingin ikki gleppa teimum av hondum, sum í 1946. Nú skal maktin fasthaldast og brúkast, kosta hvat tað vil. Hesuferð skal loysast: Endlösung.

Men sjálvandi er einki ólógligt at gera fylkingar ella átøk. Tað problematiska kann vera, at tær í veruleikanum ofta eru ódemokratiskar, tí tað eru ein leiðandi klika, ella sum her, anonymir bakmenn, sum koyra spælið.

Spurningurin er nú blivin aktuellur aftur: Hevur hesin »leiðarin« sjálvur nakran vilja? Hevur hann gorrað um annað enn hatta fullveldi (ella loysing, sum tað kallaðist fyrr)?

Høgni Hoydal er orðloysingur

Tað kom mongum dátt við, at HH avhøvdaði Signar á Brúnni, hóast Signar hevði fingið orð fyri, at um kanningarnevndin fríkendi hann, so skuldi Signar fáa landsstýrissesssin aftur. Tá HH fekk frænir av, at Signar fór at verða fríkendur, bleiv ein annar útvaldur maður, sum ikki dugdi fólkaskikk, settur í staðin. Hetta undurbarnið fór tó sum ein sápubløra. HH helt ikki orð, tað vita øll, tí er hann orðloysingur.

Høgni Hoydal er fantastur

Hann livir í einari fantasiverð, har hansara egna snakk og tað, hann verður fóðraður við av anonymum bakmonnum, myndar hansara dreymaverð. Fantasiverðin er svørt/hvít; tað er loysing ella ein rotin blokkur. Sparkaður inn í politikk tveir mánaðar undan seinasta val. Hevði gjørt seg bemerktan sum miðal miðlamann í tjóðveldisjónvarpinum. Brúkt tíð og pengar uppá at propagandera og øsa um bankamálið út frá einum trongum og partískum sjónarmiði. Yvirtrekt kontoina, so Signar seinni noyddist at fylla 3 mill. í kassan hjá sjónvarpinum. Hvørja tøkk fekk Signar?

Høgni Hoydal er skræðugákur

Sum ein gomul slitin grammofonpláta koyrir hann dag út og dag inn í somu foyru. Fullveldið er himmiríki, blokkstuðulin er rótin til alt ilt. Øll hava tit hoyrt hetta fleiri túsund ferð. Og tíverri - sum so ofta er - so eru tað tey, sum trúgva uppá hesa følsku propagandu. Fyrsta árið vóru nakrar hugleiðingar um politikk uppií hjá HH, uttan tó at vísa nakað víðsýni ella serligan eftirtanka. Í dag er alt bert ein nervøs endurtøka av somu foyru: Fullveldi er himmiríki, danskarar, javnaðarmenn og sambandsmenn eru nakrir lortar. Maðurin er ein bedrøviligur, men lívsfarligur skræðugákur.

Høgni Hoydal er ein sprellimaður.

Ja, soleiðis noyðist eg at siga tað nú. Ikki tí at tað er ólógligt at fáa e-meyl við góðum ráðum. Men tí at politiska gongdin seinastu trý árini í mangar mátar bendir á tað. Við rakett-ferð hevur hann, við góðari hjálp, tikið valdið í flokkinum, blivin floksformaður, hevur avhøvdað alla tað gomlu leiðsluna (í besta Macchiavelli-stíli), og sett sínar egnu inn.

Hevði tað so verið hann, sum var stýrimaður, men tað er hann ikki. Hann er bara sprellimaður. Har liggur vandin! Hvørjir eru bakmenninir, og hvat vilja teir. Hví eru teir anonymir. Tað hava fyrr verið feløg og fylkingar við anonymum limum, sum ikki bert høvdu demokrati á skránni! Summi hava viðurkent politiska mistakið, aðrir hava ikki.

Fær hann makt, sum hann hevur í akt, so situr ein orðloysingur, fantastur, skræðugákur og lívsfarligur sprellimaður við evsta valdinum í Føroyum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Eingin fer væl av tí, at annar fer illa

Helena Samuelsen
Í Hoyvík 11. august 2001

Øll hava gloymt Eirargarð. Ja, soleiðis segði gamli maðurin við meg í telefonini tíðliga í summar. Hann hugsaði um tey fólkini, sum búgva í teimum reyðu húsunum úti á Eirargarði í Havn.

Men úti á Eirargarði húsast so nógv fólk til dagligt, og ikki eru øll gloymd. Kemur nú niðan á Eirargarð, eru til vinstu lág hús, har fólk býr og til høgru stór íbúðarhús, har nógv fólk býr, og ikki bara fólk, sum er knýtt at sjúkrahúsinum. So eru eisini sjúkrahúsdeildir til sálarliga sjúk fólk. Heilsu- og Almannastýrið heldur til á Eirargarði, Sjúrkasystraskúlin, Almannastovan og helst aðrir stovnar við. So ikki eru øll úti á Eirargarði burturtagd og burturgloymd.

Vestastu húsini úti á Eirargarði eru ein long reyð lon, eisini timburhús ólík øllum hinum húsunum har úti.

Fólk vóru á gosi, tá tað seinast í sjeytiárunum var farið undir at byggja húsini, sum vóru bygd til 48 evnaveik fólk. Tíðin var farin frá hesari húsastøddini. Eingin kundi hugsa sær at trunka saman so nógv hjálparleys fók á einum staði. Men andveikraverndin var danskt málsøki, og danir søgdu bara, at tóku vit í Føroyum ikki við hesum, fingu vit einki.

Tað var í 1959, at danir fingu lógina, sum álegði teimum at byggja lokalt til evnaveik fólk. Men hóast tað, so var einki bygt í Føroyum, fyrr enn húsini á Eirargarði vóru bygd og tikin í nýtslu í 1980.

Vit vóru nøkur, sum hildu, at vit kortini kundu byrja her, so vit fingu bremsað flytingini til stovnar í Danmark og kundu bjóða fólki, sum ynsktu tað, at koma heim aftur á klettarnar. Men mótstøðan var stór ímóti hesari bygging, ikki minst frá avvarðandi.

Húsini vóru bygd og tikin í nýtslu í 1980. Dóttir okkara var ein av teimum seinastu, sum flutti inn. Hon hevur nú búð á Eirargarði 16A í 21 ár. Tí veit eg eisini, hvat er hent har hesi árini.

Húsini á Eirargarði 14 og 16 vóru innrættað soleiðis, at 12 og 12 fólk húsaðust saman. Seinni var tað gjørt soleiðis, at 6 og 6 fólk vóru saman. Í dag húsast 15 fólk har, og tey eru 5 og 5 saman, tríggir bólkar, sum allir eru á Eirargarði 16.

Í fyrstani vóru deildirnar knýttar at landssjúkrahúsinum. Og tað dámdi okkum ikki so væl, tí okkara fólk vóru ikki sjúk. Hetta var eisini tann tíðin, tá forsorgin fór frá tí at vera ein læknalig forsorg til at vera ein pedagogisk forsorg. Og munurin var stórur.

Fyrsta takið var tí at loysa Eirargarð 14-16 frá Landssjúkrahúsinum. Vit vildu ikki hava seingjarklæðir og alt annað til okkara, har Sjúkrahúsverk Føroya var vovið inní. Tey vóru ikki sjúklingar frá sjúkhúsverkinum. Vit vildu ikki hava mat frá sjúkrahúsøkinum niðan gjøgnum tunnilin í stálvagnum. Tað var so óheimligt.

Tað gekk ikki long tíð, so vóru allir stovnsmøblar og gardinur burtur. Tey, sum búðu á Eirargarði, áttu sjálv pengar at keypa sær møblar og gardinur fyri. Og tað var so skjótt, at øll klæðini vóru vaskað og turkað við hús og ikki flutt oman á vaskaríið á Landssjúkrahúsinum. Síðan fóru starvsfólkini sjálv at gera døgurða og alt annað. Tað bleiv meira og meira heimligt. Og so fingu búfólkini sín egna kommunulækna og nýttu Landssjúkrahúsið, sum allir aðrir føroyingar gera tað.

Alla tíðina var arbeitt við tankanum um at flyta av sjúkrahúsøkinum til meira hóskandi stað. Longu í 1972 vóru tekningar um alternativa bygging vístar fram á eini landsstevnu, Javni helt í Hoydølum.

Men so blivu fólk ov bráð og mistu málið úr eygsjón. Tann hóvligi minnilutin tapti. Og størstu tapararnir vóru tey veikastu av okkara evnaveiku, tey sum búgva á Eirargarði 16, og í dag eru kroyst upp í ein krók.

Hetta eru stór orð, men eg vil koma við eini frágreiðing. Tað byrjaði í smáum. Fólk fluttu av Eirargarði í smærri hús at búgva. Eg ivist ikki í, at nógv fingu tað betri. Men ikki øll, tí til tess vóru húsakeypini alt ov tilvildarlig og leigusáttmálarnir við. Úrslitið síggja vit. Teimum allarveikastu hevur enn ikki staðið í boði at flyta av Eirargarði. Vit mugu bara sanna orðatakið, at eingin fer væl av tí, at annar fer illa. Tað, at flytingin fór í gongd, áðrenn øll sluppu at flyta, hevur gjørt tilveruna vónleysa hjá teimum, sum eftir eru á Eirargarði.

Hví tað? Tí tey eru kroyst upp í ein krók í egnum húsum. So hvørt fólk eru flutt út, flyta onnur inn. Men húsfólkið og teirra avvarðandi verða ikki spurd. Húsini á Eirargarði 14-16 vóru bygd til evnaveik fólk. Nú standa langar greinir við stórum yvirskriftum í bløðunum um húsaneyðina hjá hesum somu fólkum, sum hava latið húsini frá sær. Yvirlýsingar í bløðunum um tað sama. Men hví mótmæla ikki avvarðandi feløg, nú teirra limir verða køvdir í sínum egna heimi? Hvør tekur ábyrgdina av hesum? Og hesi fólkini flyta ikki heiman, fyrr enn onnur og betri hús eru bygd til teirra. Tey eru hjá sær sjálvum. Eingin skuldi sloppið at flutt inn í húsini, fyrr enn alt húsfólkið var flutt úr húsunum. Tað, ið hent er á Eirargarði 14-16, hevði neyvan komið fyri aðrastaðni.

Inni í teirra húsum húsast nú so nógv onnur. Har húsast ein partur av almannastovuni, sjúkrasystraskúlin, ein psykiatrisk sjúkradeild. Tað er sum at fara 20 ár aftur í tíðina, tá vognurin við sjúkrahúsklædum møtir tær í gongini. Tað eru bara einar høvuðsdyr, so øll ganga inn og út sama veg. Og hvat mundu onnur sagt til tað, at so nógv fólk koma slóðandi inn í gongina, fólk, tey ikki kenna, og sum einki hevur við tey at gera.

Nú tað er í umbúna at stovna deild til doyggjandi fólk, er mær komið fyri oyru, at eisini henda deild skal inn í reyðu lonina í Eirargarði. Øll, sum eru so gramm eftir húsunum, skulu vera hjartaliga vælkomin, bara tey fyrst lova húsfólkinum út haðani í onnur hús, bygd eru til tey. Tá tey eru flutt, kann hospits, barnagarður og alt annað flyta inn í húsini, tí neyðin er stór. Men størri er neyðin hjá teimum, sum nú búgva har, tí tey tola ikki ágangin, men eru ikki før fyri at mótmæla.

Og nú havi eg ikki tikið starvsfólkið, sum altíð er um tey, upp á tunguna. Av teimum verður kravt nógv, tað er so vist og satt. Men tey royna sum frægast eftir umstøðunum.

Tað er látur liget at hugsa sær, at arkitektar í 1970 gjørdu eyrhyggjarnar framman fyri vindeyguni á 14-16, so búfólkini ikki skuldu síggja so nógv til tey sjúku fólkini á økinum, meðan ein sjúkradeild nú 20 ár seinni er flutt inn í húsini, og øll bróka somu úthurð.

Hvar eru feløgini, sum avvarða? Hvar eru mótmælini? Hvar eru yvirlýsingarnar?

Nú eru so nógv flutt inn í reyðu lonirnar á Eirargarði, at tað er bara eitt at gera, og tað er byggja nýggj hús til tey 15 fólkini, sum enn búgva í húsunum, og so taka tað, eftir er av heimi teirra til annað endamál. Har er ikki komandi longur hjá okkum, sum vitja, fyri bilum, og enn minni útfaraandi hjá illa gongdum fólki og fólki í rullistóli. Ferðsla an er stór á økinum og tað er einvegis ferðsla. Men tað hendir seg meira enn so, at bilar koma ímóti tær, tá tú sjálvur fylgir koyrireglunum. Tí er tað heldur ikki vandaleyst hjá fólki at fara út fyri dyr á Eirargarði.

Jú, gamli maðurin hevði rætt. Eg eri púsa samd við honum. Øll hava gloymt Eirargarð.

Tingið viðgera lækkan av oljuavgjaldi

Á tingfundi í dag kemur uppskot Sambandsfloksins um fyribils úrgildisetan av løgtingslóg um serliga avgjald á brenniolju til fyrstu viðgerð

POLITIKKUR
Eirikur Lindenskov

Tað var Suni Jacobsen, sum vegna Sambandsflokkin legði fram uppskotið. Hann segði, at Sambandsflokkurin hevur fleiri ferðir lagt fram uppskot um at taka av og minka um brennioljuavgjaldið. Uppskotini eru hvørja ferð feld av samgonguflokkunum. Oljuprísirnir eru framvegis høgir.

– Í seinastu Búskaparfrágreiðingini frá juni 2001 verður millum annað sagt, at innflutningurin av brennievni øktist sera nógv í fjør. Vit innfluttu fyri 508 milliónur krónur av brennievni ella 92 prosent meira enn í 1999. Av hesum 508 milliónunum fór meginparturin, nevniliga 450 milliónur krónur til innflutning av gassolju og brennilolju.

Víðari verður nevnt, at: »høvuðsorsøkin til stóru økingina var sera høgi oljuprísurin og høga virðið á amerikanska dollaranum«, segði Suni Jacobsen.

Ásetingin av tí fasta oljuavgjaldinum, ið samgongan setti í verk, hevur givið landskassanum eina meirinntøku í mun til, um gamla lógin var galdandi. Samsvarandi hevur brúkarin fingið eina meirútreiðslu, ið útholar realinntøkuna.

– Sambandsflokkurin metir brennioljuna vera neyðsynjarvøru hjá einstaka húskinum, borgaranum og virkinum, og eiga hesar ikki at vera álagdar risahøg avgjøld.

Uppskotið, ið Sambandsflokkurin nú hevur lagt fram, tekur oljuavgjaldið av í fyribils í eitt ár.

Í viðmerkingum til uppskotið sigur flokkurin:

– Sambandsfloksins hugsan er, at tað er ein neyðugur og uppiborin lætti, hvørt einasta húski, borgari og arbeiðspláss fáa við at samtykkja hetta uppskotið. Um miðalnýtslan hjá húskinum av olju er 4000 litrar um árið, verður lættin 3.200 kr um árið.

Umhvørvið hevur verið nevnt í sambandi við oljuavgjaldið.Tað er rætt, at dentur verður lagdur á at verja umhvørvið. Tað eru vit í Sambandsflokkinum samd í. Men vit vilja staðliga vísa á, at oljuprísurin nú er so mikið høgur, at øll fólk spara nógv um oljuna, sjálvt um oljuavgjaldið fellur burtur. Tí oljan er sanniliga ríkiliga dýr uttan oljuavgjaldið.

Sambært hesi lóg eru tað nærum bara privat og smávirkir, ið gjalda oljuavgjald. Allur annar ídnaður og virkir fáa oljuavgjaldið endurgoldið. Eftir okkara tykki vil hetta uppskotið beina burtur hendan skeivleikan, ið væl skiljandi kann skunda undir spekulasjón á økinum.

Mett verður, at landskassin seinastu árini hevur havt eina stóra meirinntøku við tað at inntøkan av meirvirðisgjaldið er hækkað munandi orsaka av høgu oljuprísunum.

Tað hevur sera stóran týdning fyri Sambandsflokkin, at borgarin sleppur lættari, við at oljuavgjaldið fellur burtur. Vit í Sambandsflokkinum vóna, at løgtingsmenn arbeiða saman í hesum máli, so tað gerst meira liviligt hjá vanliga føroyinginum. Vit vóna tí, eftir mangar royndir, at uppskotið verður samtykt.

Sambært upplýsingum frá Toll- og skattstovuni í vár verður mett, at minni inntøka landskassans av uppskotinum verður um 60 mió krónur.

SvF var ikki har

Øssur Winthereig,
tíðindastjóri
Sjónvarp Føroya

Tordur Niclasen spyr sera rámandi, hvar SvF var tá svimjigenturnar komu aftur frá EM-kapping í Stokhólmi. Og eg má við skomm svara, at vit ikki vóru til staðar – hvørki í Havn ella á Eiði. Onki stuttligt er at skriva hesar reglur, tí sjálvandi átti SvF eisini at tikið móti gentunum.

Undanførslur leggur eingin í.